# Sandoy í fokus

**Mikudagin setur Oyggjablaðið fokus á viðurskifti á Sandoynni. Lesið um:**



**Hava bæði huldufólk og Jesu-pápan á Skarvanesi**



**Ungar familjur búseta seg í Húsavík**



**Fríðgerð syngur um Jesus**



**Depilin í Skálavík liðugur í vár**



**Kann verða ov seint um 10 ár**

# Velja kanska kommunu og kirkjuráð ísenn

## Gongur tað so sum forkvinnan í felagnum fyri Kirkjuráðslimir vónar, so kann komandi kirkjuráðsval haldast samstundis sum kommunuvalið.

Snorri Brend

– Um hesi bæði valini vórðu hildin samstundis, hevði hetta uttan iva gjørt sítt til, at so nógvir limir í fólkakirkjuni sum gjørligt kundu atkvøtt, sigur Jórun Johannesen.

Um vikuskiftið helt hon sín fyrstu frágreiðing sum forkvinna í felagnum fyri Kirkjuráðslimir, sum hevur ársfund sín í leguhúsinum í Nesvík.

Tey kirkjuráðini sum sita nú eru tey seinastu, sum ikki verða vald av kirkjufólkinum við eitt demokratiskt val.

Støðan hevur mangastaðni verið hon, at bert tann eini listin er komin inn til valið, og at tað tí ikki hevur verið neyðugt við vali. Men nú verður skipanin so broytt.



ALDUR

*– Nógvir nýggir og yngri prestar eru settir í starv hetta seinasta árið. Hugaligt hevði verið, um eisini fleiri ung komu við í kirkjuráðini, sigur Jórun Johannesen, forkvinna í felagnum fyri Kirkjuráðslimir*

Mynd: Dávur Winther

### Tey ungu

Við næsta val, sum verður í 2013, verður kravt kirkjuráðsval í teimum størru bygdunum og býunum.

Á teimum støðum har val hevur verið, hevur tað víst seg, at valluttøkan kundi verið munandi størri. Og tí hevur forkvinnan í felagnum gjørt sær sína støðu greiða.

– Hetta fer helst at geva okkum nýggjar avbjóðingar, vísir Jórun á. - Eitt uppskot kundi tí verið, at hildið valið samstundis sum kommunuvalið.

Við hetta høvið er eisini møguleiki at fáa "samsvar" millum tann unga miðaldurin á teimum nýggju prestunum og á kirkjuráðslimunum. Sum heild er miðaldurin á kirkjuráðslimunum sum held hægri.

Eisini í hesum sambandi kom forkvinnan í felagnum við einum hugskoti ella ynski, sum kanska kann fremjast longu við komandi val.

– Tað hevði helst skap størri fjølbroytni, um vit løgdu okkum eftir, at minst ein kirkjuráðslimur í hvørjum kirkjuráði var fólk í tjúgunum ella tríatiárunum, vísir Jórun Johannesen á.

---

# Langt eftir á mál

**KIRKJURÁÐ: Á ólavsøku í ár eru liðin fýra ár síðani kirkjan varð yvirtikin. Á aðalfundinum hjá felagnum fyri Kirkjuráðslimir um vikuskiftið var spurningurin settur, um málið við hesi yvirtøkuni var rokkið.**

Til at meta um hetta høvdu tvær kvinnur við royndum innan kirkjuligt arbeiði, fingið til uppgávu at siga sína hugsan um málið - Gunvør Dam Jensen og Ása Justinussen.

Báðar vóru samdar um, at tað var rætt at yvirtaka kirkjuna, men um ein hyggur eftir kirkjuni uttanífrá, eru ikki tær stóru broytingarnar at hóma.

– Men tey sum arbeiða inni í kirkjuni, tey merkja at alt lógarverkið ikki er komið uppá pláss enn. Og tað er ikki nóg gott, nú skjótt fýra ár eru liðin síðani yvirtøkuna, vísti Ása Justinussen á.



JÁTTAN

*Játtan til føroysku fólkakirkjuna er lækkað í ár, men ætlanin er at fáa hesa "uppá pláss aftur" á næstu fíggjarlóg*

Mynd: Dávur Winther

Gunvør Dam Jensen helt eisini tað vera ótíðarhóskandi, at kirkjuni vantaði lógir, og at hon tí í ávísum førum varð rikin eftir gomlum mannagongdum. Men hóast hetta, høvdu tær báðar góðar vónir fyri framtíðina hjá kirkjuni, og høvdu málsetningar í hesum sambandi.

Eitt av málunum í framtíðini eigur at verða, at gudfrøði aftur verður partur av útbúgvingartilboðnum á Setrinum, og at kirkjan eisini ger sítt til, at kirkjufólkið er upplýst um týðandi gudfrøðiligar spurningar.

Báðar nevndu fíggjarstøðuna hjá kirkjuni sum eitt mál, sum ein eigur at taka við størsta álvara. Í ár er játtan lækkað rættiliga nógv.

– Avbjóðingin er, hvussu ein fær játtanina á fíggjarlógini at røkka, ella hvussu vit fáa sum mest burtur úr hesi játtan, vísti Ása á.

Ein avleiðing av minkaðu játtanini er, at fleiri kirkjur ikki fáa tær neyðugu umvælingarnar gjørdar, ella at nýggjar verða bygdar, har tørvur er á tí.

Heitt varð tí á landsins myndugleikar um at fáa játtanina til fólkakirkjuna hækkaða sum skjótast.

Her vísti kirkjumálaráðharrin, Helena Dam á Neystabø á, at eftir hennara meting er breiður politiskur vilji at rætta hetta upp aftur.

– Hetta skal helst gerast so skjótt sum tilber - kanska longu á komandi fíggjarlóg, vísti landsstýriskvinnan á.